# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Hans Thomsen, Tórshavn:

## 90 ára føðingardagur í Pálsstovu

**Skírisdag varð 90 ára føðingardagurin hjá Hans Thomsen, vanliga nevndur Hansemann, fyrrverandi landmátara, í Havn, hildin í Pálsstovu. Umleið 230 fólk, familja vinir og fyrrverandi starvsfelagar vóru savnaði hendan dagin**

Hansemann er føddur í Porkeri og vaks upp í Skemmuni sum nr. 5 av einum barnaflokki ið taldi 11. Av teimum eru fýra av systkjunum hjá honum í lívi, og vóru tey við í føðingardegnum, tey eru: Sigrid og Andrew, sum búgva í Porkeri, og Astrid og Elsa, sum búgva í Havn.

Hansemann hevur búð í Havn síðan 1955. Hann byrjaði sum landmátari í 1945 hjá Líggjasi Húsgarð, sum helt til í Vági. Seinni fekk hann starv á Matrikulstovuni í Havn, og flutti øll familjan til Havnar í 1958. Hetta starv røkti hann, til hann var 72 ára gamal

Í 1940 giftist Hansemann við Onnu Sofíu Tausen, ættað úr Hovi. Tey fingu 6 børn: Eivind, Anniku, Jórun, Niels, Ásgerð og Heðin. Anna Sofía andaðist 1978 og Eivind í 2001.

Hóast tað eru 18 ár síðan Hansemann gavst á Matrikkulstovuni, stukku fleiri av gomlu starvsfeløgunum inn á gólvið føðingardagin. Nógvar talur vóru hildnar og bólkurin Ab Libitum spældi

Hansemannn ar við til at stovna felagið Javna í 1971, og var hetta eitt av hansara hjartamálum, hann sat í nevndini og var kassameistari í mong ár. Hann hevur eisini verið formaður í Tænastumannafelagnum.

Hann hevur gingið í samkomuni í Ebenezer øll árini, og kemur hann har enn hvønn sunnnumorgun.



*Hansemann Thomsen helt 90 ára føðingardagin í Palsstovu skírisdag fyri umleið 230 fólkum. Á myndini eru Óla Hendrik av Fløtum og Petur Djurhuus, sum eisini hevur fylt 90 ár*

*Mynd: Jan Müller*



*Fyrrverandi starvsfelagar á Matrikulstovuni, f.v. Ólavur Clementsen og Hansemann Thomsen*

*Mynd: Jan Müller*



*Hansemann saman við børnunum, f.v. Heðin, Ásgerð, Niels, Jórun og Annika*

*Mynd: Jens Chr. Guttesen*



*Hansemann og Evald Sørensen arbeiddu saman á Matrikulstovuni í mong ár*

*Mynd: Jan Müller*



*Fýra systkin: Andrew, Elsa, Sigrid og Hansemann*

*Mynd: Jens Chr. Guttesen*



*Frá føðingardegnum, Birgit av Lofti, Hansemann Thomsen, Sylvia Danielsen og Óli Breckmann*

*Mynd: Jan Müller*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Felagið Blóðgevi:

## Fleiri virðislønir handaðar á aðalfundinum

**Mikukvøldið hevði Felagið Blóðgevi ársaðalfund í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum. Á fundinum vórðu tríggir blóðgevar heiðraðir og felagið fekk nýtt búmerki**

Á aðalfundinum hjá Felagnum Blóðgevi mikudagin 14. apríl vórðu virðislønir handaðar teimum, sum vunnu búmerkjakappingina, sum tey trý blóðgevarafeløgini í Føroym høvdu skrivað út. Tríggjar virðislønir vórðu handaðar. Martin Tórgarð, timburmaður í Havn, vann kappingina og fekk 1. virðisløn, Eyðun Eliasen, arkitektur í Havn fekk 2. virðisløn, og Magnus Magnussen, arkitektur á Eiði fekk 3. virðisløn.

Tær 86 tekningarnar, sum komu inn, vórðu allar sýndar fram á fundinum.



*Formaðurin í Felagnum Blóðgevi, Marita Simonsen, handar her 1. virðisløn til Martin Tórgarð, sum vann búmerkjakappingina*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Eisini vórðu serligar heiðursgávur handaðar trimum blóðgevum, sum hava latið blóð 75 ferðir og meira, teir vóru: Mortan Winther Poulsen í Hoyvík, sum hevði latið blóð 77 ferðir síðan 1957, Kjartan Christiansen í Havn, sum hevði latið blóð 75 ferðir síðan 1959, og Kristian Davidsen á Sandi, sum hevði latið blóð 75 ferðir síðan 1967.

Felagið Blóðgevi bleiv stovnað 23. mai 2001 við tí endamáli at útvega sjálvbodnar blóðgevar til Landssjúkrahúsið og saman við øðrum tilíkum feløgum í Føroyum at tryggja at sjúkrahúsini í Føroyum fáa nóg mikið av blóði.

Felagið skipar fyri fundum og øðrum tiltøkum til frama fyri limirnar og samstarvar við blóðbankan á Landssjúkrahúsinum.

Høvuðstreytin fyri at gerast blóðgevi, er at tú ert millum 18 og 60 ár og vigar meira enn 50 kg, og at viðkomandi er frískur.

Á teimum trimum sjúkrahúsunum í landinum eru umleið 1.600 blóðgevar skrásettir. Í Suðuroy eru umleið 200, í Klaksvík umleið 300 og á Landssjúkrahúsinum eru okkurt um 1.100. Tilsamans geva teir blóð umleið 2.000 ferðir um árið.

Marita Simonsen, formaður í Felagnum Blóðgevi, sigur at áhugaði eru vælkomin at tekna seg sum blóðgevar á hesum telefonum: Suðuroy tel. 371133, Klaksvík tel. 455463, Tórshavn tel. 311397, ella á heimasíðuni: www.gevidblod.fo



*Hesir blivu heiðraðir á aðalfundinum hjá Felagnum Blóðgevi: Mortan Winther Poulsen, sum hevði latið blóð 77 ferðir síðan 1957, Kjartan Christiansen, sum hevði latið blóð 75 ferðir síðan 1959, og Kristian Davidsen, sum hevði latið blóð 75 ferðir síðan 1967*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Hesir tríggir fingu virðislønir fyri búmerkjakappingina: Martin Tórgarð, fekk 1. virðisløn, Eyðun Eliasen, fekk 2. virðisløn, og Magnus Magnussen fekk 3. virðisløn*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Jóhan B. Vilhelmsen 30 ár sum bakari



16. apríl 2004 eru 30 ár síðani Jóhan byrjaði í bakaralæru hjá Frants. Og hevur Jóhan verið hjá Frant líka síðani, tó undantikið eitt tíðarskeið í '93, tá vit orsakað av kreppuni máttu steingja nakrar mánaðir.

Vit, sum hava arbeitt saman við Jóhan, kenna hann sum ein trúgvan og álítandi mann. Ein tú kanst líta á, at hann ger tað, sum hann hevur átikið sær. Og so ger tað tað ikki verri, at Jóhan er ein sera dugnaligur bakari. Hann hevur evnini til sítt yrki sum fáur, tí ikki bara dugir hann væl at baka, men eisini er hann óførur at leggja arbeiðsdagin til rættis.

Havi sjálvur arbeitt saman við Jóhan í 21 ár og umframt at hann øll hesi árini hevur verið Frants ein góður maður, so hevur hann verið mær ein hollur stuðul í okkara dagliga arbeiði á bakarínum øll hesi 21 árini.

Hesu seinnu árini hevur Jóhan verið bakarameistari hjá okkum og sum so hevur hann ábyrgdina av framleiðslu okkara. Bæði tað at framleiða nokk, men kanska mest at framleiðslan livir upp til ta góðsku, sum vit fegin vilja hava skal eyðkenna bakstur frá Frants.

Pápi, Brynhild og eg vilja við hesum ynskja Jóhan hjartaliga tillukku við hesum serliga merkisdegi.

**Heini**

### Dagurin

**16. apríl. Mariana.** Teir vita onga halga konu við hesum navni. Dagurin hevur eisini verið róptur **magnusarmessa**, til minnis um Magnus Erlendsson. Hann var jallur yvir helvtini av Orknoyggjunum, men systkinabarn hansara Hákun Pálsson, sum hevði hina helvtina, søkti at honum, og Magnus varð halshøgdur tann 16. apríl í 1115. Magnus varð seinni skírdur halgimenni, og dómkirkjan í Kirkjubø er vígd honum. Í halgilutaskápinum í múrinum eru bein av Magnusi.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu,
tá ið elskaða kona, mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Ida Anna Magnussen**

andaðist og varð jarðað.

Takk til Klaksvíkar sjúkrahús og røktarheim, heimarøktina í Kvívík og Klaksvík. Tøkk til øll, sum hjálptu til við jarðarferðina. Takk fyri kakur, blómur og kransar.

**Jakob**
**Jytta, Sonja og Asta v/fam.**